TB-ÍF 2-3 (25-17, 17-25, 21-25, 25-22, 5-15):

# ÍF hevur hondina á gullinum

**Tað eru bert fuglfjarðakvinnurnar sjálvar, sum kunnu forða ÍF í at vinna FM. Sunnudagin vunnu tær fyri fjórðu ferð í ár á TB**



*Við fjórða sigrinúm á TB í ár vissaði ÍF sær allar fyrimunir undan seinastu og avgerandi dystunum um FM-gullið*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan verður um nýggjan føroyameistara í flogbólti hjá kvinnum í ár. Tað kann í øllum førum staðfestast, eftir at verjandi meistararnir úr TB fyri fjórðu ferð í ár máttu boyggja seg fyri ÍF. Og sum støðan er nú, so verður eisini talan um spildurnýggjan føroyameistara. ÍF hevur enn ikki roynt at vunnið FM-heitið í kvinnuflogbólti, men nú skal vilja illa til, um málið ikki skal røkkast.

Ovast á stigatalvuni hava tær eitt stig fleiri enn Mjølnir, sum enntá eigur útidystin móti TB á, meðan dystirnir hjá ÍF als ikki tykjast eins ræðandi. Í øllum førum ikki á pappírinum. Her skal ÍF tær báðar næstu ferðrnar royna seg ímóti Drátti og KÍF, og tað eru í øllum førum dystir, har tað av røttum kann roknast við, at meistaraheitið verður servað heim.

### Spenningur allan vegin

Dysturin sunnudagin var annars ein av teimum heilt spennandi, og karmarnir kring uppgeðrina vóru eisini av teimum allarbest. Einir 300 áskoðarar sóu TB byrja í sama stíli, sum tær endaðu steypafinaluna, tá tær alt fyri eitt fingu kantarnar at koyra. Fyrsta settið varð vunnið uttan stórvegis hóvasták, men ÍF hevði tó lært av tapinum í finaluni.

Blokkurin fekst at rigga nógv betri, og við álopsspælinum, sum ÍF er ført fyri at spæla, bumbaðu tær seg innaftur í dystin. Tvey sett á rað gjørdu í øllum førum, at tær vissaðu sær, at TB ikki fekk ein betri settmun, men TB gav kortini ikki skarvin yvir.

Fjórða settið fór til heimaliðið, men tá ÍF so aftur fekk ferð á í seinasta settinum, var liðugt.

### Nú sær ljóst út

Í øllum førum er nú heilt liðugt hjá TB, og sjálvt í Fuglafirði eru tey nú so smátt farin at tosa um gullið.

Annika Rasmussen, sum í ár hevur ment seg til ein av stinnastu verjuleikarunum á liðnum, helt í øllum førum eftir dystin, at nú eru leikararnir so smátt farnar at hugsa um gullið.

- Dystirnir, sum vit hava eftir, eru í øllum førum tveir, sum vit eiga at vinna. Dráttur hevur gott nokk spælt okkum eitt lítið puss fyrr á árinum, men tað er í øllum førum eitt lið, sum vit at kunna taka, heldur hon. Men hon leggur tó dent á, at hetta ikki merkir, at tær taka lætt upp á nakra uppgávu.

- Nei. Avgjørt ikki. Tað eru framvegis fýra stig at spæla um, og gera vit ikki alt vit eru mentar til at taka hesi, so kann tað ganga galið, so vit eru ikki vísar í nøkrum sum helst enn, heldur hon.

Hvussu er og ikki, so kann í øllum førum staðfestast, at vegurin til gullið nú liggur víðopin fyri ÍF. Hetta kann kanska eisini gerast veruleiki longu komandi vikuskiftið, tá tær vitja í Vágunum. Samstundis hevur Mjølnir nevnliga truplan útidyst í Trongisvági, og vinnur TB har, samstundis sum ÍF fær stigini ímóti Drátti, so er gullið avgjørt.

# Holte er framvegis við

**Leygardagin vunnu Bárður og teir týdningarmikla dystin á Skovbakken, og við tveimum sigrum afturat kunnu teir vissa sær pláss í hálvfinaluni**

FLOGBÓLTSÚTISETI
*Jákup Mørk*

Bárður Mikkelsen og Holte høvdu eina trupla uppgávu fyri framman, tá teir leygardagin vitjaðu Skovbakken. Úrslitini í endaspælinum hava ført við sær, at Holte – sum annars er ein av DM-favorittunum – skal vinna teir tríggjar seinastu dystirnar, um teir skulu koma við í pottin, tá hálvfinalurnar eru á skránni.

Og tíbetur fyri Holte, so bragdaði nú loksins. Tó at talan bæði í fyrsta og triðja setti var um teprar sigrar, so gjørdist talan samanlagt um ein 3-0 sigur.

Sjálvur sigur Bárður, at hetta var fyrstu ferð í fleiri vikur, at Holte veruliga hevði viljan við í sínum spæli. Blokkurin og servutrýstið riggaðu væl, og sæð burtur frá fyrsta settinum, var talan ongan tíð um veruligar trupulleikar.

Fyri Bárð sjálvan var dagurin tó ein av teimum misjøvnu. Seinastu vikurnar hevur hann drigist við skaða i knænum, og hesin víst seg at vera somikið álvarsligur, at hann als ikki fekk tikið lut í dystinum. Einstu ráðini fyri skaðan eru hvíld og framhaldandi viðgerðir, og so fæst at síggja, hvørt føroyski hevarin verður tøkur týskvøldið, tá Gentofte Volley kemur á vitjan hjá Holte.

SÍ-Fleyr 3-0 (25-23, 25-15, 25-14):

# Sørvingar halda ondini

**Við tryggum sigri á Fleyr hitaðu teir hjá SÍ upp til brakið móti ÍF, sum verður á skránni komandi vikuskifti**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

SÍ er nú einasta liðið, sum kann hótta ÍF í føroyskum mansflogbólti. Hetta varð longu greitt fyri viku síðani, og tá Fleyr nú kom á vitjan vildi SÍ líka sum undirstrika, at hetta var eitt av sterkastu liðunum í landinum.

Fleyr mutaði tó nakað ímóti fyrsta settið, men tá SÍ fyrst fekk nóg nógvar snúningar á, so var ikki stórvegis at gera. Við fullari ferð vórðu havnarmenninir spældir langt út av vøllinum, og nú er bara hjá SÍ at fyrireika seg til stóra slagið, sum verður komandi vikuskifti.

Tá kemur ÍF á vitjan í einum dysti, sum í nógvar mátar tykist spennandi. Sjálvandi einamest tí hetta er dysturin, sum kanska kann avgera FM-stríðið í hesum kappingarárinum, men ikki minst eru vónirnar til dystin stórar, eftir framúr undirhaldandi finaludystin í steypakappingini millum liðini bæði. Tann dystin vann ÍF sum kunnugt, men nú tykjast sørvingar vilja hevna seg, og so er eeinasti spurningurin, hvørt fyrireikingarnar komandi vikuna fara at geva úrslit.



Mjølnir-Fram 3-0 (25-18, 25-16, 25-22):

# Mjølnir eltir silvurmerkini



*Uttan stórvegis rokns sópaði Mjølnir Fram til viks sunnudagin, og nú mugu klaksvíkingar bara bíða eftir, hvussu leikur fer, tá ÍF vitjar SÍ komandi vikuskiftið*

**FM-møguleikin hjá klaksvíkingunum er fokin, men við trygga sigrinum á Fram halda teir enn stutt tjóður í sørvingum á øðrum plássi**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tó at Mjølnir við tapinum fyri ÍF herfyri misti seinasta møguleikan at gera seg galdandi í oddastríðnum í mansdeildini, so tykist hetta á ongan hátt hava skalað spæligleðina á liðnum. Heldur var tað tvørturímóti, tá Fram kom á vitjan sunnudagin.

Eftir avrikið móti ÍF var nevnliga einki at ivast í, at klaksvíkingar høvdu nøkur innanhýsis viðurskifti at rætta upp uppá, og tað varð so væl og virðiliga gjørt.

Serliga var stórur munur á liðunum tey bæði fyrstu settini, har Fram ongan tíð fekk fótin fyri seg. Seiansta settið tók Mjølnir sær kanska ótilvitað av løttum, men kortini megnaðu teir eisini her at toga neyðugu stitgini heim, soleiðis at talan gjørdist um ein tryggan 3-0 sigur.

Mjølnir hevur nú bert ein dyst eftir á árinum, og tá hesin er ímóti Fleyr, er lítið at ivast í, at tvey stig eisini verða fingin til vega í hesum, og so kunnu teir stórt sæð ikki gera annað enn at bíða.

Skal Mjølnir vinna silvurmerkini, er nevnliga neyðugt, at ÍF tryggjar sær gullið, tá teir komandi vikuskiftið vitja í Sørvági. Ger teir tað so verður SÍ verandi á 15 stigum, sum er tað sama, sum klaksvíkingar kunnu røkka, og tá hava klaksvíkingarnir betri settmun. Hendir tað hinvegin at FM-avgerðin verður útsett við einum SÍ sigri, kann Mjølnir ikki ger stórt annað enn at siga takk fyri bronsuna, sum so verður handað teimum á seinasta leikdegi.

Hjá Fram man tað kennast nakað hugstoytt, at teir einki hava fingið burturúr kappingarárinum. Til tíðir hevur spælið so avgjørt verið til eitt pláss millum heiðursmerkini, men í longdini hevur støðufestið hjá liðnum ikki verið nóg gott, og so mundi málið við ólógliga leikarunum fyrr í ár ikki bøta um støðuna í so máta.

Enn kann Fram tó fáa eitt orð at siga. Teir eiga nevnliga heimadyst móti ÍF í seinasta leikumfarinum, og um fuglfirðingar tá ikki hava tryggja sær gullið, kann talan gerast um ein heilt spennandi dyst í Hoyvíkarhøllini til ta tíð.

Mjølnir-KÍF 3-0 (25-14, 25-9, 25-13):

# Einki at tosa um

**Mjølnir gjørdi somikið skjótt av, at KÍF næstan fekk tikið sama fart heimaftur**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki stórvegis roks á skránni, tá KÍF vitjaði Mjølnir um vikuskiftið. Meðan KÍF longu hevur bílagt atgongumerki til aðru deild komandi kappingarár, hevur Mjølinr enn ein teoretiskan møguleika at vinna gull, og tað var sum um tær høvdu sett sær fyri, at hesin munurin eisini skuldi vera sjonligur sunnudagin.

Alt í alt fekk KÍF heldur ikki meira enn 36 bóltar í dystinum, og tað sigur sum tað mesta um, hvussu stórur munurin er.

Hetta hjálpir tó ikki stórvegis hjá Mjølni, sum nú ikki longur sjálvar kunnu gera av, hvørt tær skulu hava gullið ella ikki. Sigurin hjá ÍF bar við sær, at tað nú eru tær úr Fuglafirði, sum hava allar trumfirnar. Mjølnir kann sum so bara syrgja fyri at vinna sítt, og so vóna. Og tað at vinna sítt fer so sanniliga eisini at krevja nakað. Komandi mótsøtðuliðið er TB, og í hóast hesar nú mugu taka til takkar við bronsuni, so er einki at ivast í, at tær ætla at vísa, hvar skápið skal standa. Ella í øllum førum, hvar tað skuldi staðið.

Fleyr-Dráttur 0-3 (21-25, 16-25, 19-25):

# Ivaleysur vágasigur

**Í týdningarleysum dysti staðfesti Dráttur plássið í miðjuni, tá tær vunnul trygt á einum tomum Fleyrliði**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki tað stóra at tosa um, tá Dráttur vitjaði Fleyr um vikuskiftið. Við einum sigri kundi Fleyr kanska skapa nakað av spenningi um fjórða plássið á stigatalvuni, men hetta kom tó ongan tíð upp á tal.

Dráttur, sum í ár hevur verið ógvuliga svingandi, hevði ongan tíð trupulleikar í dystirnum hesaferð. Frá fyrsta bríksli settu tær seg á dystin, og tó at Fleyr mutaði nakað ímóti fyrsta settið, so var hetta skjótt av ongum.

Næsta og triðja settið fóru uttan stórvegis roks til gestirnar, sum soleiðis staðfestu fjórða plássið á talvuni.

Fyri Fleyr mundi tapið kennast eitt sindur hugtungt, nú tær høvdu møguleikan at fáa fjórða plássið burtur úr einum annars út av lagi vánaligum kappingarárið. Hinvegin er einki at ivast í, at hesar seinastu vikurnar hava verið nakað hugaligari enn restin av kappingarárinum hjá Fleyr. Tær hava reist seg úr kanska størstu kreppuni hjá liðnum nakran tíð, og bara tað í sjálvum sær er ivaleyst nakað, sum gevur leikarunum betri vónir til komandi ár.

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 18 | 15 | - | 3 | 49 | 22 | 27 | 22 |
| 2 | Mjølnir | 18 | 14 | - | 4 | 48 | 17 | 31 | 21 |
| 3 | TB | 18 | 13 | - | 5 | 46 | 18 | 28 | 18 |
| 4 | Dráttur | 18 | 8 | - | 10 | 29 | 38 | -9 | 11 |
| 5 | Fleyr | 18 | 3 | - | 15 | 13 | 47 | -34 | 5 |
| 6 | KÍF | 18 | 1 | - | 17 | 8 | 51 | -43 | 1 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 14 | 12 | - | 2 | 38 | 8 | 30 | 16 |
| 2 | SÍ | 15 | 9 | - | 6 | 29 | 21 | 8 | 15 |
| 3 | Mjølnir | 15 | 9 | - | 6 | 30 | 23 | 7 | 13 |
| 4 | Fram | 14 | 6 | - | 8 | 22 | 26 | -4 | 8 |
| 5 | Fleyr | 14 | 0 | - | 14 | 1 | 42 | -41 | 0 |